# Mundi koyrt seyð yvir



MÓTBREKKA

*Her eru súkklararnir á veg niðan úr Øravík fríggjadagin, tá avgerðin í bæði einstaklinga- og liðkappingini í veruleikanum fall*

Mynd: Hilmar Jan Hansen

**SÚKKLING** Knud Glerup, sum sera sannførandi vann kappingina hjá unglingunum, var hálvan metur frá at koyra ein seyð yvir

Hilmar Jan Hansen

Tá vit siga navnið Knud Glerup, ringir óivað onkur klokka onkrastaðni, og tað er heldur ikki so løgið. Knud er sonur Jens Glerup, sum í áravís hevur verið høvuðsdómari í Statoil Kring Føroyar, men nú er fluttur niður til Danmarkar.

Umframt at hava tveir synir við, Knud og Andrias, hevði Jens eisini hesa ferð eina rúgvu av súkklarum úr Danmark við til Føroya. Og sjálvur var hann eisini við í kappingini.

Men kortini var tað sonurin, sum yvirskuggaði, tí Knud Glerup stóð seg so væl í unglingakappingini, at hann væl og virðiliga vann hana samanlagt. Í gjár var hann eisini fyrstur á mál, framman fyri ein av danskarunum, Frederik Bølle, og Jóanis Albert Nielsen, sum er úr Sandavági.

– Tað var hart at súkkla í dag, tí tað var so nógvur mjørki. Tað byrjaði annars við sól og hita í Tjørnuvík, men so bleiv kaldari og myrkari. Tað var torført at halda 50-60 kilometrar um tíman, tá sýnið bara var tíggju metrar. Tí var neyðugt at halda eitt sindur aftur, so tað skal bera til at koma fram í øllum góðum, sigur Knud Glerup, ið sjálvur var um reppið at koma illa fyri.

– Í dag vóru fleiri lomb og seyðir, ið vildu yvir um vegin, júst tá vit komu framvið, men tað gekk tíbetur uttan nakra vandastøðu. Men ta einu ferðina var eg ikki meiri enn ein hálvan metur frá at koyra ein seyð yvir, so tað kundi enda galið.

Innanhýsis millum unglingarnar var ófør kapping, og í gjár stakk Knud av frá tí síðsta kappingarneytanum á Oyggjarvegnum, og tí kom hann eisini einsamallur á mál. Hann er 17 ára gamal, so hann hevur aldur til bæði unglingar og vaksin, men hesa ferð var tað so saman við unglingunum, at hann royndi seg – og vann!




NÓGV TILSAMANS

*Tilsamans hava teir yvir 50 súkklararnir í fimm dagar lagt ikki færri enn 341 kilometrar aftur um bak*

Mynd: Hilmar Jan Hansen

# Súsanna í serflokki

**SÚKKLING** Súsanna Skylv vann aftur í ár kappingina hjá kvinnunum, og hóast hon bara sjálv onnur var við har, læt hon væl at, tí Statoil Kring Føroyar var fyri hennara viðkomandi mest ein upphiting til HM

Hilmar Jan Hansen

So skjótt sum súkklukappingin var liðug í gjár, fór Súsanna Skylv heim at pakka, og hon er nú longu farin av landinum til næstu stóru avbjóðingarnar, ið eru í triathlon. Komandi vikuskiftið skal hon kappast í HM og vikuna eftir skal hon verja DM-heitið, hon vann í fjør.

– Eg eri heilt væl nøgd við at vinna kappingina hjá kvinnunum. Eg havi lagt hetta sum eina harða venjing, sum sostatt er tann síðsta undan HM-kappingini, sigur Súsanna Skylv, sum bara hevði Marin Ennistein at kappast við, tí tær báðar vóru einastu súkklararnir í kvinnukappingini á fulla teininum.

– Tá vit bara eru tvær, kanst tú kenna teg eitt sindur einsamalla viðhvørt, men tað var øgiliga stuttligt allíkavæl. Her vóru eisini so nógvir súkklarar við hesa ferð, at eg var ongantíð heilt einsamøll.

Hon heldur, at kappingin hesa ferð hevur verið nokk so hørð, men tað hevur so samstundis givið henni uppaftur betri venjing, nú aðrar avbjóðingar eru fyri framman.

– Suðuroyggin plagar at vera sera hørð, men har gekst væl, og tað sama var í dag í Streymoynni, hóast eg hevði væntað, at eg fór at vera eitt sindur moyrari, sigur Súsanna, ið einki hevur ímóti at bjóða mannfólkunum av í Statoil Kring Føroyar.

– Eg veit ikki, hvussu teir hava tað við tí, men eg rokni bara við, at mannfólkini eisini onkuntíð hugsa sum so, at tað skal í øllum førum einki konufólk fram um meg.